

*Teitur Lassen roynir at gera vart við seg í USA, og nú fær hann góðan møguleika til tað*

# Teitur saman við John Mayer

**Teitur Lassen skal spæla á trimum konsertum saman við amerikanska John Mayer, sum er stórt navn í USA**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Teitur Lassen hevur júst verið í okkara parti av heiminum og spælt á konsertum. Hetta hevur verið í sambandi við, at fløgan hjá honum – Poetry and Aeroplanes – er givin út í Norðurlondum.

Nú er Teitur farin aftur til USA, har nógvar framførslur eru á skránni komandi tíðina.

Tríggjar av hesum framførslum kunnu av álvara fara at vísa seg at verða áhugaverdar.

Orsøkin er, at Teitur skal spæla saman við John Mayer, sum er eitt stórt navn í USA, og sum eisini er singer/songwriter.

John Mayer og Teitur skulu spæla tvær konsertir í USA og eina í Kanada, og hesar konsertir verða í døgunum frá 31. oktober til 3. november.

# Guðrun aftur í toppinum

**Hesa vikuna strýkur Guðrun Sólja Jacobsen upp aftur á næstfremsta plássið á danska Hit-listanum, sum byggir á fløgusøluna í Danmark. Á Tjeklistanum stendur hon í stað við sanginum »You´re Mine«**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Guðrun Sólja Jacobsen tekur eitt rættiligt lop rætta vegin á danska Hit-listen, sum hvørja viku ger fløgusøluna í Danmark upp.

Guðrun var annars dottin nøkur pláss niður á Hit-listen, eftir at hon fyri nøkrum vikum síðani kom inn á listan sum nummar 2, men hesa vikuna tekur hon lopið frá 8. plássið til nummar 2 í einum.

Tað er framvegis danski rockbólkurin Big Fat Snake, um liggur ovast á listanum.

**Til Føroya**

Á Tjeklistanum hjá DR P3, sum er ein singlelisti, er Guðrun hesa vikuna nummar 15 við sanginum »You´re Mine«. Hetta er sama plasering sum í síðstu viku.

Guðrun S. Jacobsen segði í farnu viku við Útvarpið, at hon hevði onkrar smærri framførslur á skránni, men eingin verulig konsertferð var á beding.

Hon roknaði tó við, at hon kom heim til Føroya seinni í ár at hava konsert.

































